# 2004 Á RANGUNI

NÝGGJÁR
*Heini í Skorini og Páll Holm Johannesen*
*Heini_skorini@yahoo.com*
*Pall@sosialurin.fo*



## Ársins undirskrift: Heðin Mortensen

Ein maður er ein maður, og eitt orð er sgu eitt orð. Tað prógvaði Heðin Mortensen mikunáttina 10. november, tá hann tryggjaði Jan Christiansen fýra ár afturat í heita sessinum. Men Heðin kundi ikki gera við, at avtalan ikki var bindandi, og hann kundi heldur ikki gera við, at sansaleysa andstøðan kroysti neyðars Heðin upp í ein krók, har hann hjálparleysur varð trýstur til at gera eina nýggja avtalu. Ímóti sínum vilja verður solidariski Heðin nú á brúnni á Vaglinum næstu fýra árini.



## Ársins kveikjari: Katja Kean

Føroyar vóru í undantaksstøðu, tá danska pornomodellin Katja Kean vitjaði í mai. Forsíðurnar vórðu ruddaðar, hóast t.d. grundlógarálitið varð lagt fram sama dag. Andsmenni Katja lærdi føroyingar um frælsi, frígering, framburð og modernitet, og mangur gamal drongur stóð andlit til andlits við sín lívs kærleika niðri í barrini í Eclipse.

## Ársins umboð: B36 og B68

Fáur umboðaði Føroyar við slíkari tign á altjóða pallinum sum fótbóltsfeløgini B36 og B68 í juli. Lettar tóku »reyða leyparan« fram, tá føroyingar vóru heili tvær ferðir á blettinum, og tað var svartasta óhepni, at eystureuropear fingu 22 mál í hinum endanum. Føroysku leikararnir kundu skála við góðari samvitsku, tá teir komu heimaftur ólavsøkudag – sama dag sum teir vórðu farnir avstað.



## Ársins krossfesting: Hermann Oskarsson

Formaður Búskaparráðsins gjørdist ársins offurlamb eftir hansara luttøku á krossferðini hjá Norðuratlantsbólkinum á Christiansborg seinast í mai. Eingin hevði hvørki sæð ella hoyrt umstrídda fyrilesturin hjá neyðars búskaparfrøðinginum, men bæði Landsstýrið, fjølmiðlar og Fiskimannafelagið vórðu skjótir úti við rívuni. Við árslok takkaði Oskarsonur fyri seg, og kvørkratak valdsharrana náddi sín um endamáli.



## Ársins hjúnarskilnaður: Høgni og Tobbi

Skandinavia var í andaleypi, tá kærleikin varð kólnaður í kongshúsinum millum Joachim og Alexandru, men eingin hevði væntað, at ástarleikurin brádliga hvarv í tjóðveldisgreipuni millum Høgna Hoydal og Torbjørn Jacobsen í oktober. Lítli Messias mátti verja seg fyri hurðaklamsi og flúgvandi granatum frá guerilla-hermanninum á Langanesi, sum heldur hoyrir heima í kubanska fjallalendinum. Í skrivandi stund røkist einki fyri, at kærleikin aftur fer at blóma.